# Ragnheiður fekk barnaheiðurin

**Mikudagin fekk íslendski rithøvundurin Ragnheiður Gestsdóttir handaða Norðurlendsku Barnabókavirðislønin a 2005. Virðislønin varð latin fyri alt ritverkið hjá høvundanum, men serliga fyri ungdómsskaldsøguna Sverðberinn, sum kom út síðsta ár**

BÓKAVIRÐISLØN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Íslendska Ragnheiður Gestsdóttir hevur skrivað og myndprýtt bøkur og frálærutilfar síðani 1984. Seinnu árini er hon tó vorðin mest kend fyri sínar endursagnir av gomlum íslendskum ævintýrum umframt eina røð av bókum fyri børn og ung.

## Tveir heimar

Eins og í nógvum íslendsku ævintýrunum, er høvuðspersónurin í bókunum hjá Ragnheiður Gestsdóttir sum oftast ein genta. Serliga er tað sagnkvinnan Leda við svananum, sum gongur aftur í bókunum hjá høvundanum.

Virðislønta skaldsøgan Sverðberinn snýr seg um gentuna Signy, sum liggur í koma á sjúkrahúsinum eftir eina bilvanlukku. Hin høvuðspersónurin er Leda, sum er navnið, Signy hevur valt sær til sín leiklut í einum lutaleiki, hon og vinfólkini eru sera upptikin av. Og soleiðis verður søgan um Signy søgd í tveimum løgum. Vit fylgja familjuni og vinunum hjá Signy og koma at kenna tey, meðan tey sita við sjúkrasongina. Samstundis stríðist Leda av øllum alvi í sínum fantastiska ævintýriheimi at fría álvarnar frá tí óndu ísdrotningini. Fyrigeving og dirvið verða týðandi tema í skaldsøguni, sum er skrivað í dramatiskari nútíð í einum filmskendum stíli.



*Íslendska Ragnheiður Gestsdóttir hevur júst fingið Norðurlendsku Barnabókavirðisløn ina 2005 fyri ritverkið sum heild og serliga fyri ungdómsskaldsøgu na Sverðberinn*

## Modernaðir lutaleikir og sagnir

Ragnheiður Gestsdóttir fekk hugskotið til Sverðberinn, tá hon helt sonin og hansara vinmenn vera í so hugtiknar av einum lutaleiki, teir kundu sita og spæla til langt út á náttarnar. Ragnheiður vildi fegin vita, hvat tað var, sum var so ómetaliga hugtakandi við at spæla hesar lutaleikir. Og skjótt mátti hon viðganga, at hesi spølini kanska ikki vóru so skaðilig, sum hon hevði hildið. Hon gjørdist sannførd um, at lutaleikir eru við til at menna hugflogið hjá teimum ungu, serliga tí teir ofta krevja, at tú lesur gamlar sagnir og gudalærur. Fyrsti íblásturin til Sverðberinn byrjaði at spíra, men tað var sonurin hjá Ragnheiður, sum kom við hugskotinum um at lata høvuðspersónin liggja í koma fyri á tann hátt at fáa flættað ein gandakendan heim inn í søguna.

Ragnheiður góðtók hugskotið, men setti uppá at skapa eitt nátúrlig samband millum gandaheimin og sjúkrahúsið, har Signy liggur. Tí valdi hon at brúka sagnkvinnuna Leda, sum vanliga sæst við einum hvítum svana, sum við sínum sermerkta sangi kann vekja menniskju ella fáa tey at sovna. Í Sverðberinn verða starvsfólkini í hvítu kitlunum á sjúkrahúsinum soleiðis ímyndin av svanunum, sum eisini virka sum hjálparar í gandaheiminum. Signy stríðist sostatt eitt stríð um lív og deyð í tveimum heimum samstundis. Eisini aðrir persónar í bókini hava ein slíkan dupultan leiklut. Til dømis er beiggi Signy, sum er rúsevnamisnýtari, tann sami, sum tann sovandi álvakongurin, meðan ísdrotningin er ein ímynd av valdinum, rúsevni kunnu hava á menniskjum.

## Vónin

Sjálvt um tað fleiri ferðir stendur um lív hjá Signy, yvirlivir hon hóast alt. Ragnheiður Gestsdóttir er nevniliga sannførd um, at hon sum barna- og ungdómshøvundur hevur skyldu til at halda lív í vónini. Men alt endar ikki bara eydnuríkt kortini. Í bilvanlukkuni fær sjeikurin hjá Signy so stóran skaða, at hann endar í koyristóli, og enn ber ikki til at siga, um hann kemur at ganga aftur - møguliga ...

Eitt annað afturvendandi tema í ritverkinum hjá Ragnheiður er happing. Í skaldsøguni Leikur á borði frá 2000 verður høvuðspersónurin Sóley happað í skúlanum, sjálvt um onki sum so er "galið" við henni. Søgurnar hjá Ragnheiður um happing eru oftast øðrvísi á tann hátt, at ongin beinleiðis kann sigast at vera óreinur. Í eini samrøðu hevur høvundurin sagt, at hon er sannførd um, at børn ikki verða happað, tí tey síggja øðrvísi út, men tí tey ikki duga at bíta frá sær, og verða hangandi í offurleiklutinum. Men tað er ein leiklutur, sum tað ber til at tveita av sær, so eisini her er vónin eitt týðandi tema.

Ragnheiður Gestsdóttir fekk eisini Norðurledsku Barnabókavirðislønina fyri sínar myndprýðingar. Hon myndprýddi sína fyrstu bók longu sum 18 ára gomul, og seinni hevur hon lisið listsøgu á Århus Universitet. Hennara tekningar eru klárar og einfaldar, og myndirnar litríkar og vakrar, við einum myndamáli, sum altíð leggur upp til, at børnini sjálvi byggja sær sínar egnu myndir víðari frá teimum.

Norðurlendska Barnabókavirðislønin varð latin fyrstu ferð í 1985.
Seinastu fimm árini hava hesi fingið virðislønina:
2004 Lene Kaaberbøl, Danmark
2003 Kristín Steinsdóttir, Ísland
2002 Thore Hansen, Noreg
2001 Edward Fuglø, Føroyar
2000 Bent Haller, Danmark




Vinnuhúsið søkir samskipara

Megnar tú at halda skil á arbeiðsmarknaðinum?

Vinnuhúsið sóknast eftir einum samskipara til at umsita arbeiðsmarknaðar- og sáttmálaviðurskifti. Viðgerð og greining av sáttmálaspurningum og sáttmálasamráðingum verður ein avgerandi táttur í arbeiðnum, og uppgávan hjá samskiparanum er at vegleiða vinnufeløgum og føroyskum virkjum.

Starvið fevnir um arbeiðsmarknaðarøkið í breiðum týdningi. Samskiparin umsitur teir sáttmálar, sum skipa privata arbeiðsmarknaðin. Hann luttekur í nevndum og arbeiðsbólkum, ið viðgera arbeiðsmarknaðarviðurskifti. Hann viðger lógir og kunngerðir, ið ávirka vinnuna og arbeiðsmarknaðin. Og hann røkir málsviðgerð og skrivarauppgávur fyri nevndir í vinnufeløgunum.

Samskiparin fær sostatt møguleikan fyri at ávirka ta leið, sum føroyski arbeiðsmarknaðurin fer, og hann er í stóran mun tann, ið svarar virkjum upp á spurningar um sáttmálar og arbeiðsmarknað.

Fyri at røkja starvið til lítar krevst sostatt av samskiparanum, at hann dugir væl at samskifta við bæði myndugleikar og føroysku vinnuna, sum hann fær tætt samstarv við. Starvið peikar í nógvar ættir, og tí er neyðugt, at tú megnar at halda høvdið kalt, hóast nógv hendir.

Søkir tú, vænta vit av tær, at tú hevur hóskandi útbúgving og neyðugar arbeiðsroyndir. Tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst, samstundis sum tú hevur góð samstarsevni. Tað liggur væl fyri at samskifta, serliga á føroyskum.

Vit bjóða eitt sera áhugavert og avbjóðandi starv í einum mennandi umhvørvi.

Lønin verður eftir avtalu.

Skrivlig umsókn eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. juli 2005. Merk umsóknina ”starv” og send hana til Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Jan Mortensen, stjóra, á telefon 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 12 vinnufeløgum, og í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og við kunning, sum kann geva politiska ávirkan. Feløgini taka sær m.a. av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Smærugøtu 9a, FO-100 Tórshavn, Tel 30 99 00, Fax 30 99 01, industry@industry.fo, www.industry.fo

www.sansir.fo